## Siglingin steðgar

Nú Eimskip hevur lagt nýggja ferðaætlan, noyðist felagið at gevast við beinleiðing rutuni millum USA, Kanada og Grønland, sigur KNR. Higartil hevur eitt skip hjá Eimskip lossað og fermt í Narsaq, men í framtíðini verður grønlendski farmurin umskipaður í Reykjavík. Eitt skip hjá Royal Arctic Line skal føra farmin úr Grønlandi og til Grønlands 3. hvørja viku. Sum skilst innflyta grønlendingar serliga bilar og bátar úr Norðuramerika.



*Nú skal Royal Arctic Line sigla millum Grønland og Ísland við farmi*
*Mynd: KNR*

## 17 ár koyrdi 153

Gjáranáttina steðgaði íslendska løgreglan einum bili sunnan fyri Havnarfjørðin, tí bilurin koyrdi alt ov skjótt. Kanningartólið hjá løgregluni vísti, at bilurin koyrdi 153 kilometrar um tíman, hóast mest loyvda ferð har er 90. Tá løgreglan steðgaði bilinum, vísti tað seg, at ein 17 ára gomul genta sat við róðrið. Tá løgreglumenninir spurdu hana, hví hon koyrdi so skjótt, greiddi gentan frá, at hon skuldi í býin, og at hon hevði ringa tíð, skrivar Vísir.

# At tryggja national rættindi í Føroyum



**- Høvuðsmálið hjá okkum við broytingum í lógini um vinnuligan fiskiskap eigur at vera at lynna sum frægast undir hjá teimum, sum ætla sær at reka vinnu - heldur enn at lynna hjá teimum, sum ætla sær at liva av at selja almenn fiskiveiðirættindi. Í seinasta enda er hetta ein ein roynd at tryggja tey nationalu áhugamálini, sum eru at varðveita øll rættindi til tilfeingið á føroyskum hondum. Gleppa hesi rættindi okkum av hondum, gerast vit húskallar í egnum landi, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

**FLOKSTING**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, helt eina rímiliga drúgva røðu á flokstingi Tjóðveldisins við Gjógv seinasta leygardag. Í blaðnum fyrr í vikuni hava vit greitt frá, hvat landsstýrisfólkini, Bjørt Samuelsen og Kristina Háfoss, søgdu, og í dag fara vit at taka ymiskt fram av tí, sum Tórbjørn Jacobsen segði.

Flokstingið byrjaði longu fríggjakvøldið, og seinnapartin leygardagin høvdu landsstýrisfólkini høvi at greiða frá tí, tey fara at arbeiða við í hesum valskeiðnum.

### Broyttar umstøður

Tórbjørn Jacobsen greiddi frá, hvussu hann heldur, at fiskidagaskipanin kann fáast á beint aftur, sum hann tók til.

- Í einum landi, sum frá náttúrunnar hond er ríkað við tilfeingi - í okkara føri livandi tilfeingi - er sjálvsagt, at støðugt verður kjakast um, hvussu frægast verður farið um stovnsfæið, og hvussu tøkan úr stovninum verður samfelagi, vinnu og fólki til størstan frama.

Landsstýrismaðurin nam við søguligu gongdina frá tí, at føroyska samfelagið flutti seg úr landbúnaðarsamfelagnum við smávegis útróðri til eitt meira og meira framkomið samfelag, sum fyri stóran part hevur bygt á inntøkur frá fiskiskapi og fiskavirking.

- Í næstan hundrað ár á teimum frælsu høvunum og síðani innanvert avmarkingarnar, sum vórðu ásettar, tá lond til endans fluttu fiskimørkini út á 200 fjórðingar. Síðan tá hava vit í stóran mun livað av tilfeinginum á landgrunninum og á Føroyabanka, eins og av fiskiveiði í fremmandum sjógvi. Fiskiveiðan í fremmandum sjógvi er at kalla øll íkomin eftir umbýti við fremmand veiðirættindi í føroyskum sjógvi. Onkur søgulig rættindi í altjóða sjógvi eru tó undantikin.

Landsstýrismaðurin segði, at føroyingar høvdu ikki fyrireikað seg til tað stóra umskiftið – og til avmarkingarnar.

- Flotin, sum nú mátti lívbjarga sær innanvert 200 fjórðinga markið, var ætlaður til heilt aðrar umstøður, og hartil mundi veiðiorkan vera í størra lagi. Valið stóð nú ímillum at gera neyðugu strukturbroytingarnar ella onki at gera. Ella sagt við øðrum orðum; vit máttu gjalda okkum burtur úr nýggju støðuni. Úrslitið av hesum var, at tað "fossaði" út í báðum borðum, bæði úr fiskastovnunum – og úr einum meira og meira sperdum landskassa.

Tórbjørn Jacobsen segði, at brakið í 1992 upp á seg er ein hin størsta búskaparliga vanlukkan í Evropu í nýggjari tíð.

- Eftir at miljardir av krónum vórðu brendar av, og 7.000 føroyingar noyddust at finna sær lívslunnindi í útlandinum, varð farið undir at finna aðrar skipanir, sum kundu loysa av konseptið við Ráfiskagrunninum. Føroyar vórðu settar undir fremmanda umsiting, og finnast skuldi ein farvegur burtur úr tíðini við almennum veðhaldum, almennum lánum, rakstrarstudningum, kilostudningum, oljustudningum og øðrum skipanum, sum í alt ov drúgva tíð høvdu hildið einum skeivum flota gangandi.

### Fiskidagaskipanin

Eftir eina tíð samdust menn um at seta í verk fiskidagaskipanina, sum varð hildin at vera rætta leiðin at ganga.

- Menn royndu nú at fáa flotan útaftur. Skipini, sum fyri ein stóran part høvdu verið ígjøgnum "konkurskarusellina", vórðu latin monnum lagaliga, og semja varð til endans um, at fiskiloyvini skuldu galda í 10 ár. Tey, sum átóku sær at virka í vinnuni um hetta mundið og sum stóðu við skivuna, tá loyvini vórðu útflýggjað, fingu óskerdan brúksrætt til tilfeingið – fólksins ogn – í eitt tíggjuáraskeið.

Landsstýrismaðurin